## DAGSINS MEINING

# Vandafull tíð

Allur heimurin bíðar í løtuni eftir, hvat USA fer at fyritaka sær eftir atsóknirnar í New York. Mangt bendir á, at USA og tess sameindu fara at svara aftur móti terroristunum og teimum, sum húsa hesum. Hetta er vorðið uppaftur meira sannlíkt, nú prógvini um, at ben Laden stendur aftanfyri atsóknirnar, eru løgd fram fyri nógvar stjórnir kring heimin.

Neyvan man nakar vera ímóti, at USA vil revsa yvirgangsfólkini. Spurningurin er bara hvussu hetta skal gerast. Tað má ikki blíva sum í Miðeystri har ísraelar og palestinar skiftast um at fremja hevndaratsóknir móti hvørjum øðrum, og har nettupp hevndin er drívandi og einasta megin.

Tey eru mong, sum halda, at USA hevur tikið eina skilagóða avgerð við ikki at leypa framav í hesum álvarsmáli. Eygleiðarar vilja vera við, at hetta at fáa USA at leypa framav hevur nettupp verið ein týðandi partur av strategiini hjá yvirgangsfólkunum. At fáa USA at skjóta og bumba í blindum, so sivilfólk í muslimska heiminum gerast offur. Hetta skuldi so vera tað, sum setti eld í allan muslimska heimin móti USA. Og í sama viðfangi vildu somu yvirgangsfólk tikið til nýggj stig so sum at brúka kemisk ella bakteriologisk vápn fyri ikki at tala um kjarnorkuvápn. Men av tí at USA enn ikki hevur gjørt annað enn at kanna og leggja tilrættis ein útvikling, so hevur tað ikki eydnast fundamentalistisku yvirgangsfólkunum at fáa rætta páskotið til at fremja ætlanir sínar.

Tað er rætt mannagongd at fáa haldgóð prógv og leggja hesi fyri ivasamar stjórnir, sum eisini liggja undir trýsti frá egnum fundamentalistiskum kreftum. Spurningurin er so bara, nær USA skal sláa til og hvussu.

Heimurin kann ikki bara standa og hyggja at, meðan religiøsir fundamentalistiskir yvirgangskroppar drepa og hótta. Vit minnast øll, hvussu lætt spæl Hitler hevði. Og vit hava minnini frá Cambodia púra fesk enn. Okkurt má gerast fyri at steðga ørskapinum meðan tíð er. Her má brúkast vit og skil. Heykar av øllum slag eru vandamiklir í hesum so álvarsliga máli. Tí mugu øll heimsins lond stuðla USA við at geva góð ráð og við at vera við í einum heimsumfevnandi stríði móti yvirgangi og fundamentalismu. Men hetta krevur eisini, at vit í vesturheiminum taka í egnan barm og brúka meiri tíð, orku og pengar til at berjast móti fátækradøminum í tilafturkomnum londum. Tað krevur, at vit við okkara vælferð vísa vilja til tolsemi og hjálp. Hetta er eingin løtt uppgáva, men mest umráðandi er at finna javnvágina millum ikki at sova í tímanum og at leypa framav. Vit mugu tí ansa eftir “eygað fyri eygað” fólkunum og gera alt fyri at koma til rótina av tí, sum kann vera ein høvuðsorsøk til stríð, kríggj og yvirgang. Við hesum skulu vit ikki geva eftir fyri yvirgangsfólkunum, men vit skulu fara longur og lurta eftir teimum hóvligu kreftunum, sum finnast í londum, sum annars geva gróðrarlíkindi fyri yvirgangsfólkum. Tað er fyrst og fremst tann vegin vit skulu fara. Tað er besti hátturin at koma yvirgangsfólkunum til lívs.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Prinsessulótir

**Bergur P. Dam**



**Samgongan heldur uppá, at Føroyar hava ikki ráð at taka sær av teim gomlu og veiku**

Herfyri hevði Løgtingið orðaskifti um paraduuppskot landsstýrisins, har knæfallið fyri heimastýrislógini verður staðfest., nevnt Yvirtøkulógirnar. Í Javnaðarflokkinum vóru vit so heppin, at hetta orðaskifti í stóran mun kom at snúgvar seg um valuppleggið, sum Javnaðarflokkurin samtykti á landsfundinum í Vestmanna.

Framsøgumaður Tjóðveldisfloksins og formaðurin í uttanlandsnevndini legði fyri. So at siga øll hansara røða var ein súr illsinnisviðmerking um okkara valupplegg. Um, hvussu dýrt og oyðileggjandi tað er. Um, hvussu Javnaðarflokkurin roynir at sabotera loysingina, tí vit vilja hækka pensjónirnar. Um, hvussu loysingarfíggindaligt tað er, at Javnaðarflokkurin vil byggja minst 160 ellis- og røktarheimspláss í komandi valskeiði. Um, hvussu undirgravandi tað er, at Javnaðarflokkurin vil betra heimarøktina, skúlaverkið og heilsuverkið. Framsøgumaður Tjóðveldisfloksins eigur tøkk uppibornað fyri, at hann á henda hátt var við til at venda hesum orðaskifti til at snúgva seg um valuppleggið hjá Javnaðarflokkinum, heldur enn sjálvsmótsigandi og illusorisku yvirtøkulógirnar hjá samgonguni.

**Trúnfylgjari á pall**

Sum dagur leið, komu alt fleiri samgonguumboð á pall og kunngjørdu, at við teirra politikki vóru ikki ráð at fremja tær ábøtur, sum Javnaðarflokkurin vil.

Ein teirra var Rúna Sivertsen úr Fólkaflokkinum. Hon ásannaði, at korini hjá teim gomlu og veiku vóru út av lagi. Og hon vildi "virkuliga ynskt" at bøtt kundi verið um hetta. Men, vísti hon á, um ellis- og røktarheimsplássini blivu bygd, so høvdu vit ikki megna at goldi fyri raksturin. So hon kundi heldur ikki taka undir við at fremja hesar ábøtur. Segði nakar kynisma?

Tað er vert at leggja merki til at tað var Rúna Sivertsen, sum boðaði frá hesu. Tí hennara leiklutur er serligur í Fólkaflokkinum. Lutvíst skal hon vera "sosiala andlit" floksins og lutvíst er hon týðuliga krúnprinsessan í Fólkaflokkinum. Hon er greitt set á uppalingarbonkin hjá gráu eminensunum í flokkinum at verða eitt møguligt leiðaraevni. Sum slík er tað eisini hennara uppgáva at verða tann, sum meldar út, tá leiðari floksins annars ikki kann.

Sostatt hevur eisini Fólkaflokkurin greitt boðað frá, at hann heldur fast um, at samfelagið skal frásiga sær alla ábyrgd fyri teim veiku í okkara samfelag.

Ikki tí, hetta kemur ikki óvart á okkum. Men var nakar, ið hevði latið seg tøla av retorikkinum, so má nú allur ivi verða burtur: Fólkaflokkurin tvíheldur um trælanýpupolitikkin.

**Moyrt kitt**

Støðu sjálvstýrisfloksins er ikki neyðugt at viðgera. Nóg mikið at minna á orðini hjá landsstýrismanninum um at stendur valið ímillum valferð og loysing, velja tey loysing.

# Hvat kann gerast fyri 400 milliónir kr.

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Kalt man merkjast eftir rygginum hjá ongum føroyingi hesar dagar. Nú hevur samgongan aftur dumma seg. Og hvør fær rokningina uppá 400 milliónir krónur?

Mikudagin 3/10 lá ein frágreiðing til tingmenn. Umleið 50 síður - maskinskrivaðar. Ikki eiti á. Sanniliga verður fari álvarsliga til verka. Helst er tað hin føroyski leisturin- ella klokkugreiðar mannagongdir, ið eru farnar at virka - hugsar ein. Tí frágreiðingin lýsir niður í minsta smálut nøkur áhugaverd, fíggjarlig viðurskiftir. Hvørji viðurskiftir?:

- Eru tað fylgjurnar av at Fólkapensiónin ikki verður prístalsregulera?
- Er tað avleiðingarnar av at brekaði nú fáa viðurskiftir síni uppá pláss?
- Ella at fleiri stuðlar nú verða játtaðir til tey fólk, ið hava brúk fyri tí?
- Ella ein frágreiðing um hvussu flogvøllurin verður bygdur út?
- Ella frágreiðing um hvussu lendingin í Mikinesi skal bøtast?

Svarið er nei til allar omanfyrinevndu spurningar!

- Tú hugsar kanska, at tað sjálvandi er ein long frágreiðing um hvørji stutt og langtíðar árinini eru fyri føringin og Føroyar av at Ríkisveitingin verður skerd við nærum 400 milliónum krónum? Tí tað hava vit í løgtinginum ikki enn fingið nakað svar uppá, hóast vit hava spurt um tað. Svarið er aftur nei!

Svarið: frágreiðingin er um Eftirlønir hjá Landstýrismonnum. Álvaratos. Hevði ikki verið meira áhugavert og viðkomandi at fingi at vita, hvørja ávirkan tað fær fyri føroyska samfelagið at blokkurin verður skerdur við 400 milliónum krónum - um árið. Ella 1600 milliónir krónur eftir einum valskeiðið.

Tað hevur ikki serliga stóran áhuga at síggja, at landstýrismenn royna at sæta sær, ímeðan fólki skal svíða.

Men frágreiðingin vísir tó greitt hvørja prioritering Landstýrið setur hægst- Vælferðina hjá sær sjálvur. Vælferðin hjá føroyingum annars er slept!


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Fiskikapping í Vestmanna

TÍÐINDASKRIV


*Vestmanna*

Um viðrar, skipar Vestmanna Ítróttarfelag fyri fiskikapping í Vestmanna leygardagin 6. oktober. Kappingin verður fyriskipað í tveimum, soleiðis at byrjað verður ávikavist kl. 8:00 og kl. 12:00. Bátarnir verða aftur í seinasta lagi kl. 18:00.

Tikið verður móti øllum fiskasløgunum, og kappast verður tí bæði um stórstu nøgd og stórsta virði. Steyp og heiðursmerkir verða latin báti og monnum á nr. 1, 2 og 3 í hvørjari kapping, ávikasvist sum vinnarar av stórstu nøgd og vinnarar av hægsta virði.

Herumframt verður eisini fiskikapping fyri børnum á bryggjuni. Børnini verða býtt í 3 aldursbólkar. Heiðursmerkir verða latin teimum trimum, ið fiska mest. Børnini kappast frá kl. 15:00 til kl. 17:00.

Tað er Føroya Fiskavirking í Vestmanna, ið letur steyp og heiðursmerkir til kappingarnar.

Tilmeldingin til fiskikappingina fer fram á bryggjuni frammanfyri Fiskavirking áðrenn farið verður avstað. Børnini skulu eisini melda til kappingina á bryggjuni áðrenn byrjað verður.

Meðan bíða verður eftir endaliga úrslitinum, bjóðar VÍF til kaffi og pannikøkur í Undirhúsinum.

# Nú skalt tú finnast

TÍÐINDASKRIV
*Vinnumálastýrið*

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, fyrireikar uppskot til løgtingslóg um adressur.

**Endamálið við lógaruppskotinum:**
Endamálið við uppskotinum er at gera eina tíðarhóskandi adressuskrá, sum skal gera tað einfalt og lætt hjá øllum at finna ávísan bústað ella ávíst stað í landinum.

Í sambandi við tilbúgving, neyðsynjarørindi og annars, tá ókunnug skulu finna fram í bygd og bý, er neyðugt við eintýðugari staðfesting.

Tá adressuskráin verður digital, verður møguligt at nýta hana á EDV saman við GPS, soleiðis, at stytsta og skjótasta leið kann varða uppgivin elektroniskt.

Hetta fer at hava stóran týdning fyri løgreglu, sjúkraflutning, sløkkilið og neyðsynjarørindi annars, eins og vinnan, almennir stovnar og einstaklingar fáa gagn av ætlaðu skipanini.

Dømi eru um, at virksemi hjá vinnu og myndugleikum er tarnað, tí ongin eintýdd, landsfevnandi adressuskipan finst í Føroyum. Verður uppskotið um adressur viðtikið í Løgtinginum, verða mangir meinbogar burtur, tá ræður um samstarv millum borgarar, vinnu og tað almenna.

Lógaruppskotið er sent til hoyringar, og er hoyringsfreistin sett til 25. oktober 2001.

Uppskotið er lagt á heimasíðuna hjá Vinnumálastýrinum, www.vms.fo

## VIÐMERKINGAR

# Svartasta samband

**Gunnar K. Nattestad**

Við at fara eftir øllum, tryggjaði samgongan at einki hendi á ríkisrættarliga økinum!

Ongantíð í søgu Føroya hevur nakað val verið so tvinnað at ríkisrættarligu støðu okkara sum seinasta val og ongantíð fyrr hevur nøkur samgonga stíla so høgt eftir at náa størri sjálvræði, ja enntá fullveldið, sum núverandi samgonga.

**Óndar tungur…**
Tá samgongan var blivin skipað var greitt, at síða 1 í samgonguskjalinum, setti kós eftir fullveldi fyri Føroyar, áðrenn árið var av. Samstundis vóru lyfti til andstøðuna um at samgongan var tilreiðar at gera breiðar semjur. Tey mest svartskygdu vildu vera við, at um stevnumiðið hjá samgonguni ikki bleiv bloytt eitt sindur, so vóru ikki vónir fyri nógvum broytingum yvirhøvur.

**…fingu rætt**
Onkur kaffifundur var hildin við andstøðuna, men greitt var skjótt at samgongan vildi ikki sleppa sínum meiriluta rætti til einsamøll at seta út í kortið. Her bleiv eingin semja uttan at andstøðan kom við í leypin og tað vildi hon so ikki. Úrslitið var at samgongan fór "einsamøll" niður at krevja skjødið uppá Føroyar, sum teir eftir øllum at døma, hildu lá á Kristiansborg.

**Sjón fyri søgn**
Nú eru so gott trý ár farin — og vit vita hvussu leikur hevur gingið. Vælvildin frá donsku stjørnini hevur verið til at yvirsíggja og samgongan, ið sum á brimfjøl reið á bæði veljara- og bankaendurgjalds-alduni, byrjaði at merkja at sandur var við at koma undir føturnar aftur. Ein fyri og annar eftir leyp av síðu eitt og tað er ikki ov nógv sagt at ein skal hyggja runt allan ríkirrættarliga sjónarringin, áðrenn ein kann fanga bjargingarbeltini, sum ymsu flokkarnir í samgongu hava tveitt út millum ár og dag.

**Pessimistarnir fingu rætt**
Tey sum um summari ’98 gittu at úrslitini á ríkisrættarliga økinum fóru at vera soltin, hava í stóran mun fingið rætt. Tað er veruliga blivið so galið at samgongan við síni vantandi samstarvsvilja, hevur tryggja at næstan einki er hent ríkisrættarliga. Við hesum er samgongan í verki havna innanfyri Sambandsflokkin, ið av illum, var tilreiðar at samráðast um alt innanfyri ríkisfelagskapin.

**Eingin endurtøka — takk!**
Tað er ikki meira enn gott ár til vit aftur skula seta krossin. Onkur vil hava valið til eina endurtøku av seinasta vali, men tað er lítið spennandi at uppliva søguna endurtaka seg við ov stuttum millumbilum; serliga um skeiðið skal vera so fruktaleyst sum hettar. Tó undan málinum sleppa vit ikki, tí enn er eingin loysn funnin.

**Lærupeningurin**
Tað er ringt at spáa um hvør verður sigursharrin á einum komandi vali, hóast tað tykist sum ríkisfelagskapsflokkarnir hava munin í løtuni. Tó, líka mikið hvat úrslitið verður, so má tað verða einum og hvørjum greitt, at eitt stórmál sum okkara ríkisrættarliga støða, ikki má leggjast á ov fáar lunnar. Tað er neyðugt at søkja semju uppá kostnað av ikki at fáa alt sítt, men vinningurin er at málið verður loyst og hond kann takast í annað ið liggur á lánið. Og tað er ikki so lítið…


